HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Hósdagur, 7. desember 2017 kl. 16:30

Á fundinum vóru:	Jeanette Blaasvær, Malan Mikkelsen, Petur Mittún, Bjørghild Djurhuus, Leivur Simonsen og Hans Jón Thomsen
Avboð:	Bogi Andreasen
Skrivari:	Jens á Skipagøtu

Skrá

Ferðsluvegleiðingin í Hoyvíkar skúla:

Semja er um, at vegleiðingin sum fyriliggur er ov long og skal styttast. Ein síða er hóskandi. Eisini skal innihaldið vera beinrakið og tilmælandi.

Hans Jón Thomsen skrivar eitt uppskot út frá vegleiðingini sum fyriliggur.

Fundur við starvsfólkini í Hoyvíkar skúla:

Jeanette Blaasvær kunnar um fundin við starvsfólknini í Námsfrøðiliga ráðnum.

Umrátt vóru evnini: Málburður, telefonpolitikkur og ábyrgd hjá lærarum og næmingum viðvíkjandi skúlans øki.

Lærararnir skulu hava eina afturmelding. Hans Jón Thomsen tekur evnini upp á leiðslufundi.

Fundur við foreldraumboðini:

Fundur við foreldraumboðini verður hósdagin 18. januar 2018.

Fundurin lokin kl. 18:15